UNDIRVÍSINGAR- OG MENTAMÁLASTÝRIÐ
VINNU- OG MIÐNÁMSSKÚLADEILDIN

**Skrátal:** 44206/102
**Máltal:** 9900967/4/VJ

# Handilsskúlin

*Lærugreinakunngerð* *August 2000*

## Enskt B

*Endamálið*

**1.** Undirvísingin verður løgd tilrættis soleiðis, at næmingurin mennir teir fýra málførleikarnar: at lurta, at tosa, at lesa og at skriva, og at hann økir málsligu og mentanarligu vitan sína og tilvit sítt um ensktmælt lond.

**2.** Næmingurin skal

1. framhaldandi menna evni síni í skrivligum og munnligum enskum,
2. duga at orða seg munnliga og skrivliga á fjølbroyttum máli, tá hann skal samskifta um almenn, mentanarlig, samfelagslig og vinnulig viðurskifti,
3. duga at lýsa og greina fagurbókmentir eins og sannsagnir,
4. duga at orða seg rætt um samfelagslig og vinnulig fyribrigdi,
5. duga at lýsa og gera viðmerkingar til almenn, mentanarlig, samfelagslig og vinnulig viðurskifti í enskttalandi londum,
6. vísa vitan um munir og líkleikar millum mentanarlig viðurskifti í Føroyum og í útvaldum enskttalandi økjum,
7. duga at nýta viðkomandi framløguhættir.

*Innihaldið í undirvísingini*

**3.1** Undirvísingin fer í høvuðsheitum fram á enskum. Øll tekstasløg verða viðgjørd á ymsum torleikastigum. Talan skal bæði vera um nýggjar fagrar bókmentir og løtubærar sannsagnartekstir. Harumframt kunnu aðrir miðlar enn teir prentaðu nýtast í undirvísingini, eitt nú myndir, filmir, sjónvarpssendingar og kunningartøkni. Hvør pultstími, har undirvíst verður við hesum miðlum, verður umroknaður til 2 normalsíður í lesipensum, tó í mesta lagi 25 normalsíður.

**3.2.** Kunningartøkni er partur av undirvísingini. Serligur dentur verður lagdur á leiting eftir tilfari í altjóða teldugrunnum og á nýtslu av skrivi- og framløguamboðum.

**3.3.** *Tekstalestur*
Næmingurin skal lesa eitt fjølbroytt úrval av løtubærum sannsagnum, herímillum almennar, mentanarligar, samfelagsligar og vinnuligar tekstir og fagrar bókmentir frá nýggjari tíð innan eitt ella fleiri av tekstasløgunum skaldsøgu, stuttsøgu, sjónleik og yrking. Næmingurin skal lesa umleið 220 normalsíður, og lutfallið millum fagrar bókmentir og sannsagnir skal vera í minsta lagi 40% av hvørjum slagi.

HOYVÍKSVEGUR 72 • POSTRÚM 3279 • FO-110 TÓRSHAVN
TEL: +298 35 50 50 • FAKS: +298 35 50 55 • E-MAIL: UMMS@UMMS.FO

Eini 4-5 evni eru partar av undirvísingini. Eitt evni er ein samanhangandi eind av bókmentarligum og/ella sannsagnarligum tekstum. Eitt av evnunum viðger eitt enskttalandi øki, har bæði almenn, mentanarlig, samfelagslig og vinnulig viðurskifti verða tikin við (Area Study). Í minsta lagi eitt evni skal vera frá handilsvinnuni. Eitt evni kann vera ein tvørfaklig einstaklingauppgáva á enskum, ið er umleið 8 A-4 síður (t.d. í enskum og marknaðarførslu ella í enskum og kunningartøkni), og sum kann verða løgd fram við munnligu próvtøkuna.

3.4 *Málførleiki*
Munnligi førleikin og úttalan verða ment við samrøðum, orðaskifti, lutaleiki, trupulleikaloysing og fyrilestrum. Næmingurin skal venjast í at nýta ymsar framløguhættir í sambandi við framløgu av evnum, trupulleikaloysing og næmingafyrilestrum.
Skrivligi førleikin verður mentur við uppgávum av fjølbroyttum slagi og longd, m.a. í tilknýti til lesipensum. Hvør næmingur letur inn 6 uppgávur, sum í vavi svara til próvtøkuuppgávur. Av hesum skal umleið helvtin vera próvtøkulíknandi uppgávur. Herumframt letur næmingurin inn 8 smáar uppgávur. Lærarin rættar og ger viðmerkingar til uppgávurnar. Upp til 25% av arbeiðnum við skrivligum heimauppgávum kann nýtast í undirvísingini til ávegisskriving.
Bæði skrivligi og munnligi førleikin verður styrktur við arbeiðinum við grundleggjandi málllærubygnaðum.

3.5 *Málfatan*
Næmingurin skal arbeiða við enskum brúkt sum móðirmál og sum altjóða samskiftismál.
Mentan, samfelagslig og vinnulig viðurskifti í enskttalandi økjum verða sammett við egið bakstøði og samleika. Almenn, mentanarlig, samfelagslig og vinnulig viðurskifti verða viðgjørd í tilknýti til pensum.

*Próvtøkan*

4. Hildin verður ein munnlig og ein skrivlig próvtøka.

5.1 Næmingar, ið fara til próvtøku eftir vanligum treytum, geva upp 150 normalsíður, umframt verkætlan. Av hesum skulu í minsta lagi 40 % vera fagrar bókmentir, ið fevna um í minsta lagi 2 tekstasløg, og í minsta lagi onnur 40% skulu vera sannsagnir, herímillum vinnuligir tekstir.

5.2 Fyri sjálvlesandi og næmingar, sum fara til próvtøku eftir serligum treytum, er próvtøkupensum tað sama sum lesipensum.

5.3 Til munnligu próvtøkuna fær próvtakarin umleið 30 minuttir til fyrireikingar, og tá er vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. Próvtøkan varir í umleið 30 minuttir, íroknað próvdøming. 2 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming. Hvør ólisin tekstur kann bert vera nýttur 2 ferðir sama dag. Øll próvtøkan fer fram á enskum. Annaðhvørt verður próvhoyrt í:

A) einum evni, próvtakarin sjálvur hevur valt, við støði í einum ella fleiri av teimum lisnu tekstunum, har eisini ólisnir tekstir kunnu vera skoyttir uppí.

ella:

B)

1. einum ólisnum sannsagnarteksti, ið er umleið 5-600 orð til longdar, sum lærarin velur. Próvtakarin skal gera ein samandrátt av tekstinum, gera viðmerkingar til hann og gera eina framløgu um hann við hóskandi framløguamboðum. Síðan verður skift orð um tekstin við støði í viðmerkingunum. Øll próvtøkan fer fram á enskum.

2. Próvtakarin skal harafturat viðgera ein breiðan spurning um eitt evni í uppgivnum pensum. Næmingurin skal í samrøðu við læraran lýsa og greina evnið, og samanbera við aðrar tekstir.

**5.4** Í fyrreikingarhølinum kann próvtakarin nýta egnar uppskriftir og teir orðalistar, sum eru útflýggjaðir í sambandi við undirvísingina, umframt allar teir tekstir, sum eru tilskilaðir í lesipensum. Til tess at styðja framløguna kann próvtakarin undir próvhoyringini brúka glærur, framløguforrit á teldu og uppskriftir, hann hevur gjørt í fyrireikingartíðini, men eitt beinleiðis handrit til upplesturs telur ikki uppeftir í dømingini.

**5.5** Í próvdømingini verður dentur lagdur á munnligan málførleika, greining, próvførslu, evni at seta tekstin í størri høpi og sjálvstøðuga framløgu.

**6.** Givið verður 1 próvtal fyri munnliga avrikið. Próvtalið verður givið við støði í einari heildarmeting, har málsligi framburðurin og førleikin hjá næminginum at viðgera ávísa evnið, telja líka nógv.

**7.1** Skrivliga próvtøkan, ið er 4 tímar, hevur hesar høvuðstættir:

1. Ein sannsagnartekstur, ið er umleið 600 orð til longdar, um almenn, mentanarlig, samfelagslig og vinnulig viðurskifti. Ein ella fleiri spurningar skulu svarast á enskum um tekstin í uppgávuni. Valmøguleiki verður givin millum fleiri spurningar.

2. Antin verður:

A) Eitt brævella ein innanhýsis frásøgn skrivað á enskum við støði í einum uppriti á enskum,

**Ella**

B) Umseting av einum teksti gjørd um almen, mentanarlig, samfelagslig ella vinnulig viðurskifti, umleið 150 orð, frá føroyskum til enskt.

3. Ein stílur (essay) verður skrivaður um eitt alment evni.

**7.2** Til skrivligu próvtøkuna er loyvt at nýta allar orðabøkur og alt tilfar, sum hevur verið nýtt í undirvísingini.

**7.3** Í próvdømingini verður dentur lagdur á, hvussu uppgávurnar eru svaraðar í mun til uppgávuorðingina og hvussu stinnur próvtakarin er í stavseting, orðatilfari, málllæru, orðlutalæru, og at hann sum heild dugur at málbera seg á rættan hátt.

**8.** Givið verður 1 próvtal fyri skrivliga avrikið. Próvtalið verður givið við støði í einari heildarmeting.